# Starvsfólk til Telebúðina í Tórshavn

„Eingin framtíð er í starvinum, framtíðin er í starvsfólkinum“

\- George Crane -



Telebúðin í Tórshavn er ein av seks Telebúðum kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar. Til handilin í Tórshavn søkja vit eftir einum starvsfólki, sum skal luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til fyri at fáa eina góða tænastu. Til rætta fólkið hava vit eitt sera spennandi starv við avbjóðandi uppgávum og ymiskum ágóðum.

**Til starvið ynskja vit eitt fólk við:**
Handilsroyndum og royndum at avgreiða kundar

- hug og førleika til kundatænastu
- førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
- evnum at samstarva í toymi og við ymiskar starvsfólkabólkar
- ídni at røkka ásettum málum
- kunnleika til enskt
- vilja at hjálpa, har tað er neyðugt
- evnum at arbeiða og avgreiða mál skjótt
- viðkomandi útbúgving, men hetta er tó ikki ein treyt.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

Telebúðin í Tórshavn er opin allar vanligar handilstíðir og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í handlinum.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Svannu F. Kjær, skj@ft.fo ella Starvsfólkadeildina á tel 303030.

Umsóknir skulu vera FøroyaTele í hendi í seinasta lagi hósdagin 27. desember 2007, og tær skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn
starvsfolkadeildin@ft.fo

**FT Samskifti er dóttirfelag í Føroya Tele. Í nýggja felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarútgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. Broytingin til nýggja dóttirfelagið er við til at tryggja eins treytir fyri kappingarneytarnar á marknaðinum. Hesir nýggju karmarnir geva nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Í felagnum starvast 105 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.**

FØROYATELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*



# Leiðari til teknistovuna

Nú nýbygningsvirksemið er økt, søkja vit eftir leiðandi verkfrøðingi til teknistovuna á Skála Skipasmiðju.

Teknistovan er mannað við skips- og maskinverkfrøðingum umframt tekniskum teknarum.

Tann, ið settur verður, kann eisini til tíðir koma at starvast við uppgávum í Tórshavn og í Runavík.

Ert tú skips- ella maskinverkfrøðingur og kanska eisini útbúgvin sum skipsførari ella maskinmeistari, ert tú allarhelst tann, vit sóknast eftir.

Arbeiðsuppgávur tínar verða í høvuðsheitum:
- at tekna skipstekniskar tekningar (maskin og/ella stál) í forritinum Inventor/Autocad
- at gera skiptekniskar útrokningar, so sum stabilitets- og styrkis útrokningar
- at samskifta við Skipaeftirlit/ klassa, veitarar og kundar
- at leggja til rættis og leiða verkætlanir.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til:

Skála Skipasmiðju
FO-480 Skála

Stílað: Dánjal Andreasen, rakstrarleiðari,

og verða okkum í hendi í seinasta lagi 15. januar 2008.

Nærri upplýsingar fáast hjá Dánjali Andreasen, telefon +298 79 11 66 ella danjal.andreasen@faroeyard.fo

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SKIPASMIÐJAN

Skála Skipasmiðja
FO-480 Skála
www.faroeyard.fo

Tel +298 30 11 60
Fax +298 30 11 61
skala@faroeyard.fo

# Eitt hús – tríggir miðlar



## Starvslýsing – tíðindafólk

**Eitt blað hvønn dag**, leypandi dagføringar av størsta tíðindaportali í landinum og útvarp. Til alsamt vaksandi framleiðsluna hjá Miðlahúsinum í Vágsbotni søkja vit nú eftir tíðindafólki.

Uppgávan hjá tær verður í fyrsta lagi at virka sum leiðari á web-økinum, har vit í løtuni røkja portal.fo, sportal.fo og planet.fo umframt netúgávuna av Sosialinum. At skriva tíðindi til blað og net er partur av hesum arbeiði. Hartil verður tú partur av toyminum, ið skal samskipa tíðindaflutningin hjá teimum trimum miðlapallunum, sum vit í løtuni fevna um.

Rætti umsøkjarin hevur góð evni at skriva og sum samskipari.

Útbúgving og royndir innan blaðmannaøkið eru avgjørdir fyrimunir, men verða tó ikki sett sum treyt. Og vit rokna við, at tú kanst byrja í starvinum í seinasta lagi tann 1. februar í 2008.

Áhugaðir umsøkjarar skulu innan 20. desember senda umsókn til:

***Sosialurin***
***Att: Jan Müller***
***Postsmoga 76***
***FO-110 Tórshavn***

Áhugað kunnu sjálvandi eisini frætta meira um starvið við at seta seg í samband við Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra, á tlf 341800 ella á teldupostí jan@sosialurin.fo

Samtakið kring Miðlahúsið fevnir í dag um tríggjar miðlapallar. Blaðútgávu, tíðindaflutning á netinum og útvarp. Tilsamans starvast um 35 fólk í samtakinum.

Sosialurin

Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

W W W . S O S I A L U R I N . F O